Eitt sund millum

Hóast eingin í Hvannasundi hevur nakað ímóti klaksvíkingum, óttast mong fyri støðuni, um kommunurnar báðar leggja saman í framtíðini.
Líkt er til at bygdarfólkið hevur ójavnar hugsanir um hetta málið. Helst er talan um tveir eins stórar partar í dag

SAMANLEGGING
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Hvannasund: Tað er friðarligt í bygdini henda seinnapartin mikudagin. Ikki eitt menniskja er at síggja, hóast veðrið er av tí fræga.

Hóast henda friðin á bygdargøtunum, er mangt sum bendir á, at friður valdar ikki heilt millum bygdarfólkið – og tey, sum manna bygdaráðið.

Hóast bygdin er skild sundur av einum sundi, hava tær fimm bygdirnar kunna að sum ein einstøk kommuna. Men nú er líkt til at vend er við at koma í.

Orsøkin til hetta er eitt mál, sum snýr seg um, hvørt Hvannasunds kommuna eigur at fara í samráðingar við Klaksvíkar kommunu um størri ella kanska beinleiðis um eina samanlegging.

Í bygdaráðnum er ikki semja um hetta málið, og millum fólkið í kommununi er heldur ikki semja. Líkt er til at bygdin gongur í tveimum í hesum álvarsama máli.

- Vit eru eitt lítið øki, og tí mugu vit a við onnur. Vit hava so einki ímóti klaksvíkingur, siga summi.

- Vit eru eitt lítið øki, og tí er vandi fyri at vit fara at hvørva í teirri stóru kommununi. Vit missa okkum sjálvi burtur, siga onnur.

Mikið tjak

Málið um eina hugsandi samanlegging byrjaði fyri sløkum tveimum mánaðum síðani, tá eitt uppskot um hetta varð umrøtt á fundi í bygdaráðnum.

Ætlanin var upprunaliga, at hetta málið ikki skuldi viðgerast í fjølmiðlunum, men innanhýsis.

Men broyting kom í, tá ið portalurin hjá lokalblaði norðoyinga, Norðlýsið bar hesi tíðindi fyrr í vikuni.

Hetta hevur sum vera man elvt til mikið tjak millum manna, og rættiliga greitt er, at tvey ymisk sjónarmið eru í hesum máli:

Annað er tað sjálvsagda í at kommunurnar leggja saman.

Hitt, at Hvannasunds fer at steðga upp í teirri stóru Klaksvíkar kommunu.

Svølgd av tí stóra

Ein vitjan í Hvannasundi mikudagin prógvaði júst hetta, at fólk hava býtt seg í tveir bólkar.

Tey, ið eru ímóti eini samanlegging við Klaksvík vísa á, at Hvannasund neyvan fer at fáa stórvegis fyrimunir í eini stórari kommunu. Teirra størsta "skrekkeksempul" í so máta er Árnafjørður.

- Ja, hygg bara eftir støðuni í Árnafirði. Henda bygdin hevur verið saman við Klaksvík í eitt mannaminni, men hvat er hent har? Einki!

- Bygdin hevur staðið í stað, og fólk hava ilt við at fáa grundøki. Taðvejden, fara vit saman við Klaksvík, so steðgar øll menning upp her í bygdini. Vit verða snøgt sagt svølgd av tí stóra, siga fólk.

Onnur sundafólk eru meiri víðgongd í sínum úttalilsum, og siga bart út, at klaksvíkingar bert eru áhugaðir í teimum rættiliga mongu milliónunum, sum kommunan eigur á bók.

- Tað er fyri mær, sum

Lívið er alt ov stutt til innanhýsis klandur. Latum okkum finna eitt gott stev og fara í positivar samráðingar við klaksvíkingar